Kaggin 40 ár

# Tvífløgan Kaggin – sangur og skemt

**FLØGUÚTGÁVA**
*Tíðindaskriv*

Tann 8. novembur sótu tólv menn á loftinum á Kondittarínum. Teir vóru: Sigurd Bech, Steinbjørn Zachariassen, Sonne Smith, Heðin Mortensen, Eyðun Jensen, Marius Joensen á Hvítanesi, Frits Joensen, Róland Thomsen, Svend Poulsen (Bambus), Thomas Micheal Smith, Kári D. Petersen og Finnur Johansen. Kaggin varð stovnaður henda sama 8. novembur 1969, og tað merkir, at í ár eru 40 ár liðin. Í tí sambandi er komin út fløgan Kaggin-sangur og skemt, sum er tilfar frá ársveitslum Kaggans í 1979, 1980, 1981 og 1984.




## Ársveitslurnar

Ársveitsla Kaggans fylgdi fastari venju. Til matna var ræst kjøt og súpan. Undirhald var, meðan borðhaldið stóð. 1979, 1980, 1981 og 1984 skipaðu Hermann, Robert o.o. fyri undirhaldinum. Á skránni var altíð sangurin um ræst kjøt eftir Edvard Hermansen, og so var eisini felagssongur, skemt, og Bambus sang »Jamboree« - einsamallur ella saman við Høgna. Onkur vísa varð borin fram, antin av Roberti ella Hermanni. At enda varð dansað frá borðinum.

## Upptøkurnar

Talan er um beinleiðis framførslur. Finn Jørgensen var so hyggin at taka veitslurnar upp á spolabond. Hann hevur tikið einar fjúrtan tímar upp, og á tvífløguni eru tveir og ein hálvur tími við góðum sangi og skemti. Talan er um løtuborið tilfar, og tí er alt ikki so væl gjøgnumarbeitt; men skemtið og sangirnir tola at koma út. Kann verða, at onkur ikki kennist við alt, sum sipað verður til, men limir í Kagganum og tey, ið høvdu samband við umhvørvið, munnu kenna broddin og tónan í skemtinum aftur. Útgávan gevur lurtaranum høvi til at uppliva veitsluhýrin í Kagganum hesi árini.

## Songurin

Tilfarið á fløguni er songur og felagssongur, serliga við Hermanni. Vit hoyra t.d. Hermann syngja góðar tættir um hendingar og persónar, sum høvdu tilknýti til umhvørvið, t.d. syngur Hermann um Slupptúrin hjá kaggalimum, Í nátt meg droymdi og um Torvald á Steinum og kortspæl í Kagganum. Hermann syngur eisini góðu vísuna um Petur Kúll. Hermann leikar ofta sjálvur á klaver, men eisini leikar Svenn Brimheim á gittar, har vit hoyra hansara meistaraligu akkordir aftur við songunum.

Robert McBirnie hermir eisini væl eftir Hermanni í sanginum »Til Havnar vit fara«, ein skuldi næstan trúð, at tað var Hermann, sum sang. Robert syngur eisini táttin um »Barber Poulsen«. Bambus er eisini sloppin upp í part við skótasanginum »Jamboree«, sum hann og Høgni syngja, Svenn leikar á gittar.


*Kaggaminni*

## Skemtið

Serliga er tað stuttligt hjá limunum, tá ið Bóka-Niels (Niels Nielsen) lesur upp úr gerðabók Kaggans, Leivur á Skála hevur eitt innslag um 4 minuttir, har hann speirekur meiningsleyst tos hjá politikarum. Hermann hevur nakrar hugleiðingar um kaggalimir og hendingar í Kagganum, serliga eru postkortini hjá Bambusi til Kaggans ógvuliga stuttlig. Sonne Smith trýnur eisini fram á pall við fløkjum í upplestri, sum onkuntíð vóru at hoyra í Útvarpinum. Robert McBirnie hermir eisini væl útborin eftir suðuroyingum, m.ø. Hjørleivi Enni og Johan Djurhuus í innslagnum »Vágssøga«.

## Útgávan

Tað er forlagið Glint, sum hevur givið út tvífløguna, og er hetta triðja fløgan hjá forlagnum. Finn Jørgensen hevur tikið upp. Finnur Hansen hevur reinsað fløgurnar. Sára Finsdóttir hevur sniðgivið. Umframt hesa útgávu hevur hon eisini gjørt húsar til fløgurnar Tónleikarfelagið 50 ár, Barnasangir við Hermanni og Svenn og Svenn Brimheim - Perlur. Í húsanum hevur Sára valt at taka nógvar myndir við, heilar 24 síður við teksti og myndum frá kaggaveitslum. Eilif Brimheim og Tórður Johannesarson hava lagt til rættis.


*Robert spælir til dans í Kagganum*


*Robert og Herman, sáli undirhalda til veitslu í Kagganum*